skemt



# Føroyskt karneval

**Í hesum døgum er karneval í Rio de Janeiro. Nógv verður gjørt burtur úr undirhaldin99um, og veitslan er ófør. Hendan partin av karnivalinum, sum vit síggja á myndini, kundu vit saktans endurtikið í Føroyum. Hví ikki hava eitt serligt runu-karneval, har fólk kunnu svimja í evju.**
Mynd: Polfoto



# Rotta í pottinum

**Vatvanarnir eru so ymiskir kring heimin, og vit í Føroyum skulu ikki verða tey fyrstu at finnast at øðrum og teir serstøku rættum. Men alíkavæl. Hendan delikatessan úr Vietnam er ikki akkurát nakað fyri okkum. Her hava fólk í bygdini Dinh Bang koyrt eina rottu í pottin. Sagt verður, at rottur kunnu brúkast í nógvum rættum, og vanligt er at kóka tær ella steinkja tær. Vælgagnist!**
Mynd: Polfoto

## Leyst og fast um stórt og smátt

**Hvat skal ein nevna nýggju samgonguna? Alt millum himmal og jørð?**
**SOS-samgongan: "Sosialisma Og Sjálvstýrið"**

**Um samgongan heldur? Tað veldst um hvønn innstilling ella hvørja null-stilling Heini hevur?**

**Tað er kalt millum Tjóðveldi og Heina. Null gradir!**

**Tað verður antin ein tunnil, ella Heini, sum spreingir samgonguna!**

**Hvørji landsstýrisfólk Tjóðveldi velur? Tað er ein AKADEMISKUR spurningur!**

**Kanska onkur fyrrverandi løgtingsmaður ikki FINNUR seg í, at Kristina Háfoss er vald í Landsstýrið?**

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Hvussu ofta?**
Sum ein kendur maður einaferð altíð segði
Útvarpið

**Ræðuliga myrkt**
Her eru bara stearinljós at síggja, so vit síggja púrasta einki
Útvarpið

**Hvar vóru tey ?**
Nú eru øll liðini funnin til hálvfinalurnar
Portalurin

**Nýggjur forsætisráðharri?**
**Obama vann stórsigur í Danmark**
Portalurin

**Avvenjing sum vil nakað**
Deyðadømdur fyri at drekka seg fullan
Dimma

**Har kundu fleiri verið send**
Beatles-sangur er sendur út í Rúmdina
Planet.fo

**Rudda forsíðuna!**
Telduspøl eru fyri menn
Dimma

**So plagar at vera**
Nógvur vindur var í ódnarveðrinum seinasta hósdag
Útvarpið



# Yvirkroppaball

Nei, hendan myndin er ikki tikin kring Norðoyatunlin, har menn hava til vana at ganga í lítlum ella ongum klæðum. Hetta eru marinuhermenn í Suðurkorea, sum skulu gjøgnum eina serliga roynd nakað eystan fyri høvuðsstaðin Seoul.